## DAGSINS MEINING

# Trygd í tunlum

Tunnlar er á ymsan hátt tryggir farvegir, men tað skerst heldur ikki burt, at teir kunnu vera sera vandamiklir, um óhappið hendir. Vágatunnlin er nakað heilt fyri seg, og har eigur als einki at kunna henda. Kortini er longu eitt álvarsamt óhapp hent í hesum tunnli.Tað kundi verið ein stór vanlukka, um illa vildi til. Almenningurin hevur krav uppá, at nakað álvarsamt verður gjørt til tess at bøta um ella bara tað at raðfesta trygdina hægri. Tað er tørvur á, at tiltøk verða framd til tess at tryggja, at bilførarar halda seg innan markið fyri mest loyvdu ferð. Her er als ikki nóg væl lýst í sjálvum tunnlinum, hvat mest loyvda fer er. Er hon 50, 60 ella 80 km um tíman? Tunnilsvegurin er jú sum ein annar rasarabani og her ikki minst hjá ungum fólki, sum koyra um næturnar t.d. í ella úr dansi, og tá tað er meira ella minni frí koyring, tí tá er mest sannlíkt, at løgreglan ikki er til arbeiðis. Her má nakað gerast sum skjótast. Vit hava fleiri ferðir á hesum stað eftirlýst ein ferðslupolitikk í sambandi við undirsjóvartunlar. Hvat t.d. við løgregluni. Hevur hon sett út í kortið av nýggjum við hesi nýggju ferðslumentanar avbjóðingini eitt nú at hava løgreglufólk koyrandi um næturnar!

Spurningurin um eftirlit við ferðsluni i tunnlinum eigur at verða tikin upp. Vágatunnilin er so sermerktur, at hann krevur serstakar atgerðir til tess at eftirlitið skal verða nóg mikið neyvt. Spurningurin er um ikki videoupptøkutól áttu at verið nýtt í eftirlitinum. Hetta hevði eisini bøtt sum trygdina sum heild. Videotól verða uttanlanda nýtt á vegastrekkjum, har tørvur er á sera neyvum eftirliti við ferðsluni. Hetta er eitt sera víðgongt stig at taka, men alt eigur at verða gjørt til tess at byrgja fyri tí stóru vanlukkuni.

Eisini trygdin í øllum hinum tunnlunum eigur at verða tikin upp til metingar. Tá fíggjarlógin varð lýst vísti tað seg, at alt ov lítið er sett av til at bøta um tunnilstrygdina sum heild. Hetta kann ikki góðtakast, og eigur málið tí at verða tikið uppaftur. Hvør hevur ábyrgdina, um ein stórvanlukka hendir í einum tunnli, og tann neyðturviliga útgerðin ikki er tøk inni í fjallinum? Tann tíð er farin, tá tey ferandi lótu sær lynda bert at koma fram sum skjótast. Fólk krevja trygd, og fólk vita, at heilt nógv kann gerast til tess at bøta um trygdina. Men hetta kostar pengar, og tað er skyldan hjá avvarandi myndugleikum at útvega tann pening, sum trygdin kostar. Verður spart á hesum øki, kann tað gerast nógvar ferðir dýrari í seinna enda.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Teatermeldelse

**Hans Jensen**
*Hvalvík*

Som en af de tusinde tilskuere til verdenspremieren på den fabelagtige Hollywoodunstruktør, Anfinn Kallsberg's nyeste mesterværk „Korsfæstelsen" føler jeg trang til at skrive nogle ydmyge og beundrende bemærkninger.

Selvom manuskriptet var meget tyndt, og handlingen var noget langtrukken, lykkedes det vor guds benådede instruktør at holde hele nationen naglet til TV-skærmen i flere timer. I sandhed en flot præstation, når man tænker på at alle andre end instruktøren selv kendte resultatet på forhånd.

Titlen „Korsfæstelsen" er meget sigende og giver stykket et passende tilskud af religiøse undertoner, der er helt rimelige, når man tænker på at Folkeflokken ligesom jøderne korsfæstede en af deres egne unden nogen grund.

Det usympatiske ved stykket var den ukritiske brug af mental vold, der blev anvendt på hovedpersonen. Ren sadisme fra instruktørens side, men selvfølgelig, havde man fulgt de diskrete henstillinger, man havde fået fra humane aktører som Tjóðveldisflokkurin, Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin, var der jo ikke blevet noget skuespil.

Det bærende element i stykket var naturligvis selve torturen af offeret, mesterligt opbygget af vor egen kommunistforskrækker, Shakespeare skuespilleren Óli Breckmannn. Det skal indrømmes, at nogle af hans replikker ikke var helt up-to-date, og hørt hjemme i den kolde krigs tid, men gode tekstforfattere hænger ikke på træerne i dag. Ellers var hans retorik en sydstatsprædikant værdig. Óli er et fund i et hvert skuespil. Ofte kan han bære stykket alene.

Efter en uendelighed af grove insinuationer lykkedes det så endeligt at få hovedpersonen udmyget igennem pløret og til at bryde samman i fuld offentlighed.

Det er svært at forstå et sådant TV-stykke, men måske har instruktøren en overordnet hensigt, der ikke fremstår klart for almindelige dødelige.

Personlig synes jeg, det var et væmmeligt skuespil, og når man så tænker på at alle skuespillerne er på finansloven, mener jeg tiden er inde til at skære drastiskt ned på kulturstøtten. Er det en sådant makværk, vi reaktionære skatteydere skal betale for?

Nå, men det var jo bare et skuespil, den slags unødvendige idioti sker jo heldigvis ikke i virkeligheden.

# Er eitt lemjandi verkfall alt stríðið vert?

**Atli Hansen**



Í 4-spalta grein í Dimma lætting 22.01.03 roynir Ellintur Abrahamsen helst at rættvísgera sína niðurbinding av skipaflotanum við at lýsa verkfall fyri sínar limir frá ársbyrjan.

Nú siga serfrøðingar, at eingin tímir at lesa eina so langa grein og serliga ikki tá íð hon bara er spekkað við fakligum upplýsingum. Men vit, sum fingu høvi at snodda til samráðingarnar. kunnu fara inn á tað reglluna, sum viðkemur okkum og her vil Ellintur Abrahamsen breggja sær av at hava vunnið 0,25 part afturat til 2. stýrimann á nótabátunum.

Men hvør er veruleikin? Ein Pyrrhus sigur.

Á makrelveiðu í januar mána 2002 fekk 2. stýrimaður á Jupiter kr. 157.000 + frítíðarløn kr. 18.850 við at fáa 1,25 partar - íalt kr. 175.850

Í januar mána 2003 fær 2. sýrimaður á Jupiter við 1,5 parti kr. 54.000 + frítíðarløn kr. 6.480 - íalt kr. 60.480 og har kemur ikki meira nú, tí makrelurin er farin suður um tað markið, sum nótaskipini hava loyvi at koma til.

Munin streikaði Ellintur Abrahamsen burtur við millum lítlari og ongari undirtøku frá limunum. 1. stýrimennirnir á teimu størru nótabátunum máttu gjalda við at fara níður í hýru.

Prísurin, sum 2. stýrimaður á Jupiter mátti gjalda bara í januar mána 2003 fyri tvørheitina hjá formanninum er kr. 115.370. Tað eru 8 nótaskip við 8 2. stýrimonnum. Afturat hesum koma 8 reiðaríir, sum hava mist stórar inntøkur (og hetta var sjálvandi endamáli) fyri ikki at tala um tey samfelagsvirðir, sum eru farin fyri skeyti og ongantíð koma aftur.

Í gerandisdegnum arbeiða manningar og reiðaríir ógvuliga væl saman og nógvir batar verða gjørdir í sáttmálaskeiðinum við einum gevandi samarbeiði ímillum arbeiðsgevara og arbeiðstakara, men tá íð feløgini koma upp í fær tað ongan enda, fyrr enn annar parturin liggur eftir á. Niðurbrótandi arbeiðskampar, endaleysar samráðingar um smáting og undirskriving av sáttmálum í svøvnrúsi hoyra eini farnari tíð til. Samarbeiði um felags mál hoyra framtíðini til.

Tvørir fakfelagsformenn eiga ikki einsíðað at kunna leggja eitt samfelag lami. Tað er einki lutfall millum tey smáting, sum verða nýtt til at steðga einum samfelag við og tey virðir, sum eru í vanda ella beinleiðis fara fyri skeyti. Tapini verða ongantíð innaftur-vunnin. Tí mugu aðrar leiðir finnast og tær finnast.

Tí er spurningurin um ikki bæði arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar á fiskivinnuøkinum áttu at tikið seg burtur úr sínum feløgum og saman gjørt teirra egna forum, har framtíðar samarbeiðshættir vera mentir og avtalaðir út frá teimum veruligu umstøðunum og teimum felags áhugamálunum, vit hava - í staðin fyri beinhart fakfelagstyranni.

Men ein slík nýhugsan krevur dirvi. Hon kann hava arbeiðsloysi við sær - millum tey, sum skulu liva av ósemjum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Úrslitið av sáttmálasamráðingunum 3. og 4 januar 2003

**Ellintur M. Abrahamsen**
*v/ Føroya Skipara- og Navigatørfelag 16. januar 2003*



**Í nýggja sáttmálanum, sum undirskrivaður varð millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Føroya Reiðarafelag 4. januar 2003, vóru gjørdar broytingarnar, sum skrivað niðanfyri. Tað, sum verður skrivað við skráskrift er sjálvar broytingarnar. Viðmerkingarnar til tey einstøku stykkini eru skrivað við vanligari skrivt:**

*1 §2, stk. 12. Undir uppiløgu, verftsuppihaldi v.m. av tí skipi, skipari/stýrimaður vanliga ger tænastu umborð á, kann skipari /stýrimaður og reiðari gera avtalu um, at skipari/-stýrimaður fær loyvi til at gera tænastu við øðrum skipi hjá øðrum reiðara, uttan at missa uppsagnarfreistina, men at hendan tænasta ikki telur við í hansara uppsagnarfreist.*

Viðmerking til 1: Í § 2, stk. 8. stendur, Skipari/stýrimaður hevur rætt til:
- 1 mánað uppsagnarfreist, tá viðkomandi hevur verið mynstraður samanhangandi í sama reiðarí í eitt ár.
- 2 mánaðar uppsagnarfreist, tá ið viðkomandi hevur verið mynstraður samanhangandi í sama reiðarí í tvey ár.

Í §2, stk. 10 stendur: »við samanhangandi skilst, at skipari/ stýrimaður ikki hevur verið mynstraður við øðrum reiðaríi/ skipi í millumliggjandi tíð.«

Tað er komið fyri, at skipari hevur mist rættin til uppsagnarhýruna, orsakað av, at viðkomandi hevur verið við skipi hjá øðrum reiðarí, vegna tað, at skipið, viðkomandi var skipari á, lá, tí skipið onga kvotu átti.

§ 2, stk. 12 er fingið inn í sáttmálan, so at skipari og stýrimaður, ið hevur frí frá skipinum viðkomandi, siglir fast við, kann gera avtalu við reiðaríið, um viðkomandi ætlar sær við øðrum reiðaríi, tá skipið viðkomandi er við, ikki er í vinnu, ella at viðkomandi hevur frí ein langan túr, og viðkomandi fer ein stuttan túr við einum øðrum skipi. Fyri at verveita rættin til uppsagnarhýruna, skal viðkomandi tó vera tøkur at fara avstað við skipinum, viðkomandi siglir við, tá skipið skal fara.

Í FSN ætlaðu vit at fáa fylgjandi tekst inn: »Liggur skipið, skipari/ stýrimaður/ stýrimenn vanliga ger tænastu á, og viðkomandi fer við skipi hjá øðum reiðarí ímeðan, skal hetta tó ikki skerja rættin til uppsagnarhýruna, skipari / stýrimaður skal tó verða tøkur, tá skipið fer aftur til fiskiskap«.

Ta orðingina fingu vit ikki semingsmenninar at taka við. Munurin er, at eftir uppskotinum hjá FSN hevur maður skipari/ stýrimaður ikki skyldu at spyrja reiðaríið, um hvat viðkomandi brúkar sína frítíð til.

Í orðingini, sum kom inn í sáttmálan, so missir skipari/stýrimaður ikki rættin til uppsagnarhýruna, um viðkomandi mynstrar við einum øðrum skipi enn tí, sum viðkomandi er fast við, **treytin er tó, at viðkomandi skal hava gjørt avtalu við reiðaríið.**

1 Í §5, Stk. 1, blivu 3 mánaðir broyttir til 2,5 mánaðir. Í §5, stk. 3 blivu 4 mánaðir broyttir til 3,5 mánaðir. Teksturin er tí nú:

Tá skipari/stýrimaður hevur verið mynstraður við skipi í minst 2,5 mánaðir, hava teir rætt til fría heimferð.

Stk. 2. Skipari/stýrimaður skal tó halda fram í starvinum í upp til ein mánað, um tað verður mett, at skipið í hesum tíðarskeiði kemur í havn, haðani heimferðin fer at kosta munandi minni ella er munandi lagaligari.

Stk.3. Mynstrað verður ikki av í fremmandari havn, fyrr enn avloysari er komin til skipið, og mynstrað er til nýggjan túr. Tó kann reiðari ikki draga túrin út um 3, ávíkavist 3,5 mánaðir, uttan at avloysararnir eru seinkaðir av orsøkum, sum eru reiðaranum óviðkomandi.

Viðmerking til §5, stk. 2 verður sagt, at skipari/stýrimaður skal tó halda fram í starvinum í upp til ein mánað, um tað verður mett at skipið í hesum tíðarskeiði kemur í havn, haðani heimferðin fer at kosta munandi minni ella er munandi lagaligari, so merkir hetta sjálvsagt ikki, at: . . Skipari/stýrimaður skal tó halda fram í starvinum í upp til ein mánað, um tað verður mett, at skipið í hesum tíðarskeiði ikki kemur í havn, haðani heimferðin fer at kosta munandi minni ella er munandi lagaligari. Sagt við øðrum orðum, at um skipið er í eini havn t.d. Harbour Grace, og vantandi kemur aftur í somu havn ein mánað seinni, so gevur tað ikki reiðarínum rætt til at halda skipara/ stýrimanni út um 2,5 mánaðir, tí treytin er, at ferðin kann gerast munandi lagaligari ella bíligari.

1 Í § 10 er komið nýtt stk. 8 og er soljóðandi: §2 stk. 8. Skipari/stýrimaður, ið er bundin at skipinum undir landing í Føroyum, eigur rætt til løn smb. § 15 stk. 2. T. v.s at viðkomandi eigur niðursiglingarhýru fyri ta tíðina.

4 Í §12 er sum nýtt stk. 1 sett: . *Royking verður bannað felagshølum umborð.*

5 Í § 12 er loyvdur frádráttur fyri proviant dagførdur til at vera 80 kr. pr. dag pr. mann, grundað á prístalið 01012002.

6 Í §20, um søluvirði, er skoytt upp í 1 stk: *»Sølugjaldið skal ikki vera hægri enn veruligi kostnaðurin«.*

1 Í 25 um inntøkutapstrygging, er treytin, *at skipið skal hava ligið í minst 14 dagar fyri at hava rætt til tryggingarútgjald, frá 8. degi, strikað.*

1 Nýggj § 34, um eftirútbúgving og skeiðvirksemi, er komin inn í sáttmálan, og er soljóðandi:

Reiðaríið rindar fyri øll kravd skeið, so sum brandskeið og trygdarskeið har reiðaríið skal gjalda skeiðkostnaðin, og skipari/-stýrimaður setur frítíð til fyri at fara á skeið. Eftirútbúgving og skeiðsluttøka uttanlanda verður at avtala millum skipara/stýrimann og reiðaríið.

**2. partur**
**Serreglur (reglur fyri hvønn skipabólk)**

9 Í sáttmálanum - Línuskip/snelluskip til ísfisk verður bonusið hjá skiparanum lækkað frá at *verða 3,2% til at vera 3%,* og hjá stýrimonnunum verður bonusið lækkað frá at vera *1,6% til at vera 1,5% . Prosentini, tá tað eru 13 menn ella færri, lækkaðu tilsvarandi.*

Um ein í nøkrum føri kann siga, at kravið hjá Føroya Reiðarafelag hevur verið grundað, so var tað í sáttmálanum fyri línuskip. Søgan í tí málinum er:

Fyrr var tað soleiðis, at í sáttmálanum millum Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag var tað soleiðis, at reiðaríið fekk ein manningarpart fyri egningarmaskinuna. Í 1986 kravdi FR, at reiðaríini, eftir sáttmálanum millum FSN og FR, skuldu hava ein part fyri egningarmaskinuna. Tað vildu vit í FSN ikki góðtaka í fyrstani, men samdust so um, at loyvt skuldi verða at rokna einn manningarpart fyri egningarmaskinuna, men so skuldu eykapartarnir hjá skipara og stýrimonnum hækka ávikavist frá 3% til 3,2% og frá 1,5% til 1,6%.

Síðan er tað hent, at fyrst bleiv bert at rokna egningarmaskinuni 0,5 part, og so seinni, eg haldi tað var í 99, varð tað strikað í øllum sáttmálum, at loyvt var at rokna egningarmaskinuni part. Sostatt bleiv grundarlagið fyri hækkingini, sum varð gjørd í eykapørtunum hjá skipara og stýrimonnunum, burtur.

1 Í § 42 sáttmálanum fyri kraftblokkaskip við nót og troli. Stk. 1 fyri skip minni enn 1.5000 brt. ( við nót) vóru reglurnar:

Um manningartalið er 12 ella fleiri, um roynt verður við troli, var eykaparturin hjá 2. stýrimanni 0,5 eykapart. FR hevur tó í teirra, broytta sáttmála, sett eykapartin hjá 2. stýrimanni til 0,25 og hava avroknað eftir tí, hóast teir eru gjørdir varugir við, at tað er skeivt.

Um manningartalið var 11 ella minni, svaraði eykaparturin til 0,25 part.

§ 42, stk. 2. Fyri skip minni enn 1.500 brt (við troli) vóru reglurnar:

Skiparin fekk 1,75 eykapart. 1. stýrimaður fekk 0,75 eykapart. 2. stýrimaður fekk 0,25.

Eftir nýggja sáttmálanum er tað nú fyri: Skip minni enn 1500 brt við nót, bæði um manningartalið er 12 ella fleiri og 11 ella minni, og tá somu skip veiða við troli, er eykaparturin hjá 2. stýrimanni broyttur til at vera 0,375 eykapart. T.v.s ein lækking frá 0,5 til 0,375, tá roynt verður við nót og 12 menn ella fleiri eru við, og ein hækking frá 0,25 til 0,375, tá roynt verður við troli, um 11 menn ella færri eru við. Tá roynt verður við troli, er parturin eisini hækkaður frá 0,25 til 0,375 eykapart.

Fyri kraftblokkaskip, yvir 1500 brt, ið royna við nót og troli, var tað soleiðis, at:

| | |
|---|---|
| Skiparin fekk | 1,75 eykapart |
| 1 stýrimaður fekk | 0,75 eykapart |
| 2. stýrimaður fekk | 0,25 eykapart |

Sersáttmáli var tó fyri Christian í Grótinum og Krúnborg, ið segði at:

| | |
|---|---|
| Skiparin fekk | 1,75 eykapart |
| 1 stýrimaður fekk | 0,875 eykapart |
| 2. stýrimaður fekk | 0,5 eykapart |

Eftir nýggja sáttmálanum er tað nú:

| | |
|---|---|
| Skiparin fær | 1,75 eykapart |
| 1 stýrimaður fær | 0,775 eykapart |
| 2. stýrimaður fær | 0,5 eykapart. |

Sostatt er parturin hjá 1. stýrimanni á Krúnborg og Chr. Í Grótinum lækkaður frá 0,875 til 0,775, og parturin hjá 1. stýrimanni á øllum hinum nóta- og trolskipunum yvir 1500 brt er hækkaður frá 0,75 til 0,775.

Parturin hjá 2. stýrimanni er nú á øllum nóta- og trolskipum yvir 1500 brt 0,5 eykapart.

1 Eykapartarnir í sersáttmálanum fyri JUPITER eru teir somu sum fyri onnur nóta- og trolskip yvir 1500 brti, men býtisprosentið 20.

2 Tað var eingin sáttmáli fyri NORÐBORG, tá teir framleiddu, annahvørt skóru til flak ella heilfrystu.

Nú er sersáttmáli gjørdur fyri NORÐBRG, ið sigur:

Fyri nóta- og trolveiðu utttan viðgerð umborð verður avroknað sambært § 42 í sáttmálanum. Kraftblokkaskip við nót og troli fyri skip omanfyri 1.500 BRT. Parturin til manningina er her 17,5%. Verður ein partur av veiðuni viðgjørdur skal hesin avroknast eftir talvuni niðanfyri. Er meira enn helvtin av veiðuvirðinum virkað vøra verður øll lastin avroknað eftir talvuni niðanfyri.

Tá framleitt verður umborð er parturin til skipara og manningina:

| | |
|---|---|
| 28 mans ella fleiri | 28,00% |
| 27 mans | 27,75% |
| 26 mans | 27,50% |
| 25 mans | 27,25% |
| 24 mans | 27,00% |
| 23 mans | 26,75% |
| 22 mans | 26,50% |
| 21 mans | 26,25% |
| 20 mans | 26,00% |

Aftrat omanfyri nevndu hýru til skipara og manning verða eykapartarnir til skipara og stýrimenn soleiðis:

| | |
|---|---|
| Skipari | 1,75 eykapart |
| 1. Stýrimaður | 0,825 eykapart |
| 2. Stýrimaður | 0,50 eykapart |

Er skipið á eini framleiðslu, sum fellur uttanfyri minstulønarskipanina, tryggjar reiðaríið ta alment ásettu inntøkutrygdina.

Tá manning fer umborð ella á land uttanlands sambært skiftisskipan, rindar reiðaríið hesar útreiðslur.

**Reglur um avloysaraskipan:**

Skipari og stýrimenn øðrumegin og reiðaríið hinumegin skulu, áðrenn túrur byrjar, avtala eina avloysaraskipan.

Grundarlagið fyri eini slíkari skipan er, at manningin so vítt gjørligt eftir eini frammanundan lagdari ætlan er eina ávísa tíð umborð og í landi.

1 Skipari/stýrimaður og reiðarí kunnu eisini avtala, at inntøkurnar kunnu javnast yvir eitt longri tíðarskeið, so at parturin pr. dag verður tann sami hjá øllum, og at skipari/stýrimaður verður avroknaðir eftir teimum døgum, teir eru umborð. Fyrsta tíðarskeiðið verður frá byrjan til endan av summarsildafiskiskapinum.

1 Miðað verður eftir, at hvør maður er umborð 2/3 av samlaða dagatalinum, skipið er í vinnu í einum ári.

1 Goldið verður skipara og stýrimonnum fyri hvønn mánað so nær upp á ætlaðu inntøkuna sum gjørligt. Hetta er eisini galdandi fyri teir, sum eru heima.

1 Avloysarar fáa ta dagløn, sum er galdandi í tí skeiði, viðkomandi er umborð.

Verður eitt fast útgjald pr. mánað, kann reiðaríið í slíkum útgjaldi mótrokna útgoldna inntøkutrygd hjá viðkomandi.

1 Í sáttmálanum fyri »Veiðu við trolarum á saltfiska- og flakaveiðu« bleiv skoytt upp í: *og/ella at fiskurin verður viðgjørdur, so sum kruvdur, kruvdur og avhøvdaður ella skráskorin v.m.*

1 Í sáttmálanum »Frystitrolarar, sum heilfrysta umborð« varð skoytt upp í: *Og / ella at fiskurin verður viðgjørdur, so sum kruvdur, kruvdur og avhøvdaður ella skráskorin v.m..*

Viðmerking til 12: Til sáttmálan fyri frystitrolarar sum heilfrysta umborð høvdu vit í FSN skotið upp at yvirskriftin bleiv broytt til: *»Heilfrystur fiskur er fiskur, sum er frystur við høvdi og gørnum« .*

Hví semingsmenninir funnu upp á at koma við einari yvirskrift til henda sáttmálan, sum eisini er skoytt upp í ein annan sáttmála, virkaði heilt løgið, men FSN góðtók uppskotið alíkavæl út frá tí, at teir flestu trolararnir, sum hava brúkt sáttmálan, eru navngivnir til at brúka »Sáttmálan fyri trolarar á saltfiska og flakaveiðu«, sum eisini hevur fingið sama ískoyti.